


*Viljormur Davidsen var við frá byrjan*

# Føroyingarnir vóru við

Viljormur Davidsen og Bjarni Jørgensen vóru á vøllinum, tá FC Fyn og Aarhus Fremad, har Krzysztof Popczynski er venjari, spældu venjingardyst í gjár. Úrslitið var 0-0.

Viljormur Davidsen var við frá byrjan og røkti uppgávuna sum vinstri vongverji. Bjarni Jørgensen varð innskiftur.

Heimasíðan hjá FC Fyn skrivar, at Aarhus Fremad hevði ongan upplagdan málmøguleika í dystinum, og at FC Fyn var nærri sigrinum.

*- uni*

# Arbeiðið boðið alment út

Heimasíðan hjá Neistanum skrivar um vikuskiftið, at P/F Kontrast hevur, vegna Neistan, boðið út arbeiðið at byggja høllina við Landavegin. Ætlandi fær Neistin byggiloyvi frá Tórshavnar kommunu í næstu viku, men framvegis er MVG-málið ikki endaliga samtykt.

– Vit hava frætt, at málið í løtuni er í fíggjarnevndini, og at tað kemur á tingborð aftur fyrsta dagin. Eitt er tó vist, at ikki fyrr enn mvg-málið er samtykt í løgtinginum, kann Neistin fara undir at byggja høllina, skrivar heimasíðan, og leggur afturat, at tann 4. apríl verður greitt, hvat høllin fer at kosta.

*- uni*

# Jákup hevur spælt seinasta landsdystin

**FÓTBÓLTUR** Tað er ikki líkt til, at 40 ára gamli Jákup Mikkelsen verður landsliðsmálverjin næsta árið

Uni Holm Johannesen



Gunnar Nielsen fer neyvan at spæla næsta hálva árið. Hann brast saman við mótstøðuleikara og fekk álvarsligan løst í knæið, tá eykaliðini hjá Manchester City og Boltin spældu fyrr í vikuni. Brian Kerr, landsliðsvenjari, noyðist tískil at finna annan málverja til landsdystirnar í summar.

Jákup Mikkelsen hevur framvegis ikki tosað við Brian Kerr, men tað liggur ikki í kortunum, at klaksvíkingurin skal verja málið.

– Mín uppgáva á landsliðnum er at vera málmansvenjari. Tórður Thomsen og Meinhardt Joensen hava verið næstir í røðini eftir Gunnar Nielsen, og tað eru teir framvegis, sigur Jákup Mikkelsen.

Klaksvíkingurin loysti annars Gunnar Nielsen av í landsdystunum í heyst, tá Føroyar spældu móti Serbia og Norður Írlandi. Tað vóru eftir øllum at døma hansara seinastu landsdystir.

Jákup Mikkelsen spælir við ÍF í 2011.

# 10 dagar eftir

**FÓTBÓLTUR** Flytingargluggin letur aftur tann 10. mars á miðnátt

Uni Holm Johannesen

Tá skulu allir fótbóltsspælarar, sum skulu hava yrkissáttmála, hava flutt sítt leikaraloyvi til føroyska felagið. Yrkisleikarasáttmáli er eitt krav, um tú skal spæla í Vodafonedeildini.

Fótbóltssambandið upplýsir, at TMS-skipanin hjá FSF verður brúkt til hesar spælararnar, sum skulu flyta loyvi til Føroya. Ymisk skjøl skulu leggjast saman við umbønini um flyting av leikaraloyvi.

Tá talan er um spælarar undir 18 ár, sum skulu flyta leikaraloyvi til Føroya, er freistin eisini tann 10. mars. Í slíkum málum skal FSF hava skrivliga umbøn og frágreiðing um, hví leikarin flytir til Føroya, saman við øðrum skjølum. Hesi verða síðani latin FIFA til avgreiðslu, umvegis TMS-skipanina fyri »Minors«.

*uni@sosialurin.fo*